FØROYA HANDILSSKÚLI



Starv á Føroya Handilsskúla:

# LÆRARI TIL TELDUSTØÐINGAR

**Um teldustøðingaútbúgvingina:**
Teldustøðingaútbúgvingin er styttri framhaldsútbúgving, ið tekur 2½ ár.

Útbúgvingin fevnir í høvuðsheitum um systemmenning, forritan, tøkni og virki. Kjarnuøkini eru systemmenning og forritan; tøkni og virki eru ætlað at stuðla undir kjarnuøkini. Umframt hetta eru seinast í útbúgvingini sergrein, praktikk og høvuðsuppgáva.

Neyvari kunning um útbúgvingina er á heimasíðu skúlans, www.fh.fo.

**Arbeiðsuppgávur tínar eru m.a. at:**
- undirvísa í viðkomandi lærugreinum
- leggja til rættis undirvísingargongdir, verkætlanir og próvtøkur
- leggja til rættis fakliga innihaldið í útbúgvingini í samstarvi við leiðslu skúlans
- luttaka í ráðlegging og verkætlanum á skúlanum

**Vit vænta, at tú:**
- hevur viðkomandi útbúgving á kandidatstigi ella aðra hægri útbúgving, ið gevur førleikar at undirvísa teldustøðingum
  hevur áhuga í undirvísing
  dugir væl at samstarva og samskifta
- vilt vera við til at menna útbúgvingina og skúlan
- ikki ræðist nýggjar avbjóðingar

Tað er fyrimunur, men ikki ein treyt, at umsøkjarin hevur royndir við líknandi undirvísing.

**Vit kunnu m.a. bjóða:**
- eitt fakliga mennandi undirvísingarumhvørvi
- eftirútbúgvingarmøguleikar
- góðar arbeiðsumstøður
- ein spennandi og gevandi gerandisdag

**Setanartreytir:**
Starvið er tíðaravmarkað og verður sett eitt ár í senn. Talan kann vera um parttíðarstarv ella um fulltíðarstarv. Starvsstaður er Handilsskúlin í Tórshavn.

Lærarar á teldustøðingaútbúgvingini verða løntir sambært galdandi sáttmála.

Starvið verður sett skjótast til ber, og í seinasta lagi 1. august 2009, um ikki onnur avtalað verður gjørd.

**Umsóknir:**
Umsóknir við avritum av viðkomandi skjølum vera at senda Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegi 77, Postsmogu 177, 110 Tórshavn. Umsóknir skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 3. juli 2009.

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Ainu L. Knudsen á tel. 317177 ella á alk@hsh.fo.

Á Føroya Handilsskúla ganga umleið 200 næmingar á Hægri Handilsskúla (HH) og 200 næmingar á Fyrisiting, handli og skrivstovu (FHS). Undirvísingin fer fram í Havn og á Kambsdali. Í Havn starvast um 35 lærarar, á Kambsdali 20. Umframt HH og FHS skipar Føroya Handilsskúli fyri kvøldskúla- og framhaldsútbúgvingum, so sum teldustøðingaútbúgving, HD og akademiútbúgving. Teldustøðingaútbúgvingin er skipað sum fulltíðarlestur í 2½ ár.

FØROYA HANDILSSKÚLI

FØROYA HANDILSSKÚLI

Postsmoga 177
110 Tórshavn
Tel 31 71 77
Telefax 31 33 74

www.fh.fo

SENDISTOVAN

BARNATÆNASTAN

# MÓTTØKA

Í samband við at Barnatænastan fær nýggjan samleika, nýggja heimasíðu og er flutt í nýggj hølir í Niels Finsensgøtu 37, verður almenn móttøka í nýggju hølum okkara mikudagin 24. juni 2009 kl. 13 til 15.

ØLL ERU VÆLKOMIN.

Vinarlig heilsan
BARNATÆNASTAN

# Frá SøluRásini 2009

Sølustevnan verður í høllini á Skála 7. og 8. november. Allir framsýnarar frá í fjør fáa møguleikan at vera við aftur í ár. Er pláss og tað er onkur, sum vil vera við í ár, vinarliga send ein t-post til ag2112g9@skulin.fo og skriva, hvat tit ætla at selja. Hetta er 12. árið og hevur stevnan altið verið sera væl vitjað.

Vinarliga
**SøluRásin2009**

